# Bridge áttundi partur: Byrjanarmeldið 1 grand

Í sætta parti sóu vit, at 1 grand lovar 15-17 HP og javna hond. Um makkarin meldar 1 grand, hvør er so skipari?
Svar: Tað er tú! Hví?
Tú veitst rættiliga neyvt, hvat makkarin hevur! Hinvegin veit hann als ikki, hvussu sterk tín hond er, og hvussu nógv kort tú hevur í hvørjum liti.

## Skiparagrundreglan

*Tann av tykkum, sum hevur rættiliga greiða mynd av, hvussu hondin hjá makkaranum sær út, er skipari. Skiparin ræður fyri, um steðgast skal á einum lágum meldi, ella tit skulu stýra víðari móti útgangi ella voli.*

Í veruliga bridgespælinum er tað ikki altíð svararin, sum er skipari, men tá fyrsta meldið er sangur, er makkarin altíð skipari. Í dømunum niðan fyri hevur makkari tín hvørja ferð byrjað meldið við 1. grandi, og tú fert í skiparakasjettina.

**Minnist til**:

| | |
|---|---|
| Útgangur: | 26 HP |
| Lítlaslemm: | 33 HP |
| Stóraslemm: | 37 HP |

### Dømi:

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 1. ♠ E64 | ♥ 8732 | ♦ B73 | ♣ 1084 | Meld pass |
| 2. ♠ KB7 | ♥ E1084 | ♦ D1095 | ♣ D8 | Meld 3 UT |
| 3. ♠ KD54 | ♥ 972 | ♦ EK8 | ♣ ED6 | Meld 6 UT |
| 4. ♠ EB10 | ♥ KD83 | ♦ DB7 | ♣ EKD | Meld 7 UT |
| 5. ♠ 98 | ♥ E108 | ♦ EB76 | ♣ 9854 | Meld 2 UT |
| 6. ♠ EK | ♥ DB9 | ♦ D982 | ♣ K872 | Meld 3 UT |

**1:** Svararin hevur bara 5 HP, og saman við teimum 15-17 eygunum hjá makkaranum er tað ikki nóg mikið til útgang. Skiparin steðgar tí og sigur pass.
**2:** Við 12 HP dugir tú sum skipari at síggja, at tit hava tilsamans minst 27 eygu, og tað er nóg mikið til útgang. Skiparin stýrir móti útgangi, og makkarin sigur pass!
**3:** 18 HP við sanghond hinu megin borðið gevur minst 33 HP, og tað er nóg mikið til litlavol. Sanghondin sigur sjálvsagt pass til avgerðina hjá skiparanum.
**4:** 22 aftrat 15-17 gevur minst 37 HP, og stóravol er tí eitt frálíkt hugskot.
**5:** Tú hevur 9 HP og saman við teimum 15-17 hjá makkaranum hava tit samanlagt 24-26 HP. Kanska hava tit nóg mikið til útgang. Skiparin ráðførir seg tí við makkaran og meldar 2 UT. Hetta er ikki eitt endaligt meld men lagt verður upp til makkaran, um tit skulu fara í útgang! Hevur sanghondin 15, lítla hond, sigur makkarin pass, men við 17 er meldið 3 UT. Hevur sanghondin 16, veldst um tíggju, og so ber til at fara í útgang. Situr tú við sanghondini og ivast – so hygg upp og met um mótspælararnar. Tú spælir móti livandi menniskjum, sum kunnu ger mistøk!
**6:** Sjálvt um tú hevur 15 HP, hava tit ikki nóg mikið til lítlavol. Tit hava í mesta lagi 32 HP. Minst til, at tað gevur ikki meira at melda 4 ella 5 UT enn 3.

Niðurstøða: Skiparin avger sum oftast, um meldið er 3, 6 ella 7 ut, og so einki meira! Svarið 2 UT tekur makkaran við upp á ráð, ein spurningur um at fara í útgang. Við lítlari hond sigur makkarin pass, við stórari 3 UT.

Tilsvarandi er tilfellið, um svarari hevur 16 - 17 HP, so kann hann siga makkaranum frá sínari styrki við at melda 4 UT, sum opnari meldar pass til um hann hevur minimum, men 6 UT, um hann hevur maksimum.

Hevur svarari 20 HP, kann hann melda 5 UT, sum sigur við opnara: Makkarin, um tú hevur 17HP, so klára vit allarhelst stóruslemm, ella meldar tú 6 UT

## Uppgávur

Makkarin hevur opnað við 1UT, hvat meldar tú við hesum kortum?

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1. ♠ EKD | ♥ B1093 | ♦ K9 | ♣ ED95 |
| 2. ♠ K76 | ♥ D95 | ♦ K65 | ♣ 10852 |
| 3. ♠ 982 | ♥ ED6 | ♦ K1093 | ♣ 876 |
| 4. ♠ KD6 | ♥ 982 | ♦ ED62 | ♣ 1083 |
| 5. ♠ E4 | ♥ B107 | ♦ 843 | ♣ DB1073 |
| 6. ♠ 98 | ♥ EB9 | ♦ KB10952 | ♣ 72 |

Hvussu melda Norður og suður hesar hendur, um norður gevur kortini?

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 7. Norður: | ♠ ED54 | ♥ KB107 | ♦ KB6 | ♣ B6 |
| Suður: | ♠ K7 | ♥ E82 | ♦ D983 | ♣ 9872 |
| 8. Norður: | ♠ D7 | ♥ E108 | ♦ EKB107 | ♣ D98 |
| Suður: | ♠ E1084 | ♥ KB6 | ♦ 963 | ♣ B65 |

Svarini upp á spurningarnar venda á høvdinum í fyrsta teig.

1: Melda 6 UT. Saman við teimum 15-17 eygunum hjá makkaranum hevur tú 34-36 HP, nóg mikið til lítlavol, men ikki nóg mikið til stóravol.
2: Melda pass. Saman við makkaranum hevur tú samanlagt í mesta lagi 25 HP, og tað er ikki nóg mikið til útgang. Tað er tí eingin orsøk til at siga 2 UT. Tvørturímóti, tí vandin fyri at fáa ov fá stikk er ov stórur.
3: Melda 2 UT, sum letur makkaran taka støðu til, um ráðiligt er at fara í útgang.
4: Melda 3 UT. Saman við makkaranum hevur tú minst 26 HP.
5: Melda 2 UT, eitt ivamál. Tú hevur bara 8 HP, men tín góði 5-litur ger hondina meira verda.
6: Melda 3 UT. Við tí sterka 6-litinum er hondin meira verd, enn eyguni siga. Við einum langliti ber væl til at fáa útgang við nøkrum færri eygum enn 26 HP.

7:

| N | S |
|---|---|
| 1 UT | 2 UT |
| Pass | |

Við sínum 9 HP leggur Suður upp til útgang, men Norður hevur bara 15 HP og noyðist tí at siga pass.

8:

| N | S |
|---|---|
| 1 UT | 2 NT |
| 3 UT | Pass |

Aftur leggur Suður upp til útgang, men hesa ferð hevur Norður 16 HP og góðan 5-lit og ivast tí ikki i at melda útgang.